## MB skipar fyri Nósa-Cup

Í døgunum 10. til 11. desember skipar Miðvágs Bóltfelag fyri innandura kapping í Ítróttarhøllini á Giljanesi.
Spælt verður í 9 aldursbólkum. Hjá kvinnum er talan um tríggjar aldursbólkar, sum býta seg millum árgangirnar 1997 til 1989. Á mannfólkasíðuni er talan um fimm aldursbólkar. Smápiltar, piltar, smádreingir, dreingir og menn.
Hjá monnunum, í dreingjadeildini og í elstu gentudeildini eru fra spælarar á vøllinum í senn. Á hinum liðunum eru fimm spælarar á vøllinum. Tilmeldingar skal vera farin fram hjá fyrireikarunum áðrenn 5. desember.

**-mørk**

# Mjølnir kom ígongd

**Við einum tryggum útisigri á ÍF tóktust menninir hjá Mjølni veruliga at koma ígongd hetta vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fýra dystir vórðu spældir í teimum báðum bestu flogbóltsdeildunum um vikuskiftið. Størstur mundi spenningurin vera á Kambsdali, har mansliðið hjá Mjølnir var á vitjan hjá ÍF. Mjølnir hevur havt eina heldur tunga byrjan upp á árið, men hesa ferð bragdaði av álvara.

Talan varð um tryggan 3-0 sigur, og sæð burtur frá fyrsta settinum, var ongan tíð nakar sum helst ivi um, hvat var betra liðið.
Hin dysturin í mansdeildini var millum SÍ og Nøvuna, har SÍ vann væntaða trygga sigurin.
Hjá kvinnunum vóru somuleiðis tveir dystir á skránni.
Í Sørvági var KÍF á vitjan hjá SÍ, sum hevur verið sera væl koyrandi higartil í ár. Men vertinnurnar mundu fáa ein sannan hvøkk, tá dysturin byrjaði. KÍF stríddist nevnliga av øllum alvi, og tær megnaðu eisini at taka fyrsta settið. Og hóast SÍ vann næsta settið trygt, so bitu gestirnir aftur frá sær í triðja settinum. Ta ferðina megnaðu tær tó ikki at halda fast, og so kundi heimaliðið trygt koyra ætlaða sigurin heim.
Hin dysturin í kvinnudeildini var á Kambsdali, har Mjønlir vann tryggan 3-0 sigur.

### Úrslitini

**Meistaradeild kvinnur**
**SÍ-KÍF** 3-1 (24-26, 25-14, 25-22, 25-12)
**ÍF-Mjølnir** 0-3 (settúrslitini ikki tøk)

**Meistaradeild menn**
**ÍF-Mjølnir** 0-3 (22-25, 17-25, 17-25)
**SÍ-Nøvan** 3-0 (25-10, 25-12, 25-9)

**Flogbóltsstøður - Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 7 | 17 | 16 |
| 2 SÍ | 7 | 6 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 12 |
| 3 TB | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| 4 Mjølnir | 7 | 3 | - | 4 | 11 | 15 | -4 | 6 |
| 5 ÍF | 6 | 1 | - | 5 | 7 | 17 | -10 | 2 |
| 6 KÍF | 8 | 1 | - | 7 | 9 | 22 | -13 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 14 | 5 | 9 | 8 |
| 3 Mjølnir | 6 | 3 | - | 3 | 12 | 9 | 3 | 6 |
| 4 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 10 | 14 | -4 | 4 |
| 5 Nøvan | 6 | 0 | - | 6 | 0 | 18 | -18 | 0 |

StÍF-VB 21-25 (11-11):

# VB fekk dygga mótstøðu

**Strandakvinnurnar lótu seg ikki imponera av VB, sum helst hevði roknað við einum lættari sigri**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Áðrenn U-23 kappingin hjá kvinnum varð blást ígongd um vikuskiftið, avgreiddu StÍF og VB dystin sínamillum, sum varð útsettur, tá verkfall var fyrr í heyst.
Sum verjandi meistarar hava VB-kvinnurnar havt tað trupult í vetur, og millum annað kastaði seinasta vikuskifti einki av sær, hóast talan tá var um tveir dystir.
Tí var einki at ivast í, hvat kravið var hesaferð, og hóast tær loystu uppgávuna, so var talan ikki um nakað sannførandi avrik.
StÍF beit nevnliga væl frá sær á Skála. Fyri steðgin eydnaðist als ikki hjá VB at skræða seg leysar av mótstøðuni, sum enntá var á odda fleiri ferðir.
Fyrstu minuttirnar eftir steðgin, kom tó vend í. VB togaði seg alt fyri eitt fýra-fimm mál framum, og tann munin hildu tær fast um til dystarlok.
Sum ikk ieinaferð, so var tað Daiva Toumaite, sum gjørdi mest um seg á VB-liðnum - hesa fefrð við 10 málum. Hjá StÍF hava tey tó ársins stjørnuskot frá seinasta kappingarári, og Rebekka Justinussen vísti enn einaferð, at hon væl kann gerast ein heilt stórur fongur hjá liðnum.

### FAKTA

**StÍF-VB 21-25 (11-11)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8(4), Ninna K. Johansen 4, Poula D. Olsen 3, Súnfríð B. Johansen 2(2), Paula B. Høgnesen 2, Malan Petersen 1, Guðrun Ólavsdóttir 1
**VB:** Daiva Toumaite 10(3), Christina Holm 5, Laila Jespersen 3, Rannvá Augustinussen 3, Margreth Augustinussen 2, Svava Vesturgaard 2
**Brotskøst:** StÍF 7, VB 5
**Útvísingar:** StÍF 2, VB 2
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur Skeel

**SUNSET KAPPINGIN — KVINNUR**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 9 | - | 0 | - | 1 | 294 | 191 | 103 | 18 |
| 2 Neistin | 11 | 9 | - | 0 | - | 2 | 295 | 218 | 77 | 18 |
| 3 Kyndil | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 220 | 215 | 5 | 14 |
| 4 VB | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 230 | 182 | 48 | 12 |
| 5 VÍF | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 264 | 264 | 0 | 10 |
| 6 StÍF | 11 | 3 | - | 0 | - | 8 | 249 | 274 | -25 | 6 |
| 7 Søljan | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 173 | 259 | -86 | 4 |
| 8 Tjaldur | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 179 | 301 | -122 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN — MENN**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 219 | 192 | 27 | 13 |
| 2 H71 | 8 | 5 | - | 1 | - | 2 | 238 | 191 | 47 | 11 |
| 3 VÍF | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 228 | 223 | 5 | 10 |
| 4 StÍF | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 205 | 217 | -12 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 207 | 232 | -25 | 4 |
| 6 Neistin | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 220 | 262 | -42 | 2 |

## Gult kort til Toda

Tað gongur einki serligt hjá Start í Royalu liguni. Um vikuskiftið spældur teir móti Vålerenga, og tann dystin taptu teir í Start við 3-1. Longu í hálvleikinum var støðan 3-0, og tó at Start minkaði um munin við beinleiðis frísparki móti dystarenda, so var talan ongantíð um nakran serligan spenning. Heldur ikki hóast avrikið hjá Start var nakað væl betri eftir steðgin.
Todi Jónsson spældi allan dystin fyri Start, men heldur ikki hann fekk gjørt nakað serligt um sæð. Eitt gult kort eftir góðum korteri varð tó skrásett.
Eitt er, at úrslitini í Royal League ikki hava verið nakað serlig. Hinvegin kann Start fegnast um, at áskoðararnir veruliga tykjast spentir til komandi kappingarár. Soleiðis hevur felagið longu nú boðað frá, at øll sitipláss til komandi árið longu eru seld. So er spurningurin, hvørt Todi og teir aftur hesa ferð fara at amast móti oddinum.

**-mørk**

**Danska Sas-ligan**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK (M) | 19 | 14 | - | 4 | - | 1 | 37 | 12 | 25 | 46 |
| 2 Brøndby (S) | 19 | 13 | - | 3 | - | 3 | 38 | 17 | 21 | 42 |
| 3 Viborg | 19 | 11 | - | 4 | - | 4 | 37 | 21 | 16 | 37 |
| 4 OB | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 28 | 21 | 7 | 29 |
| 5 FC Nordsj. | 19 | 6 | - | 7 | - | 6 | 29 | 25 | 4 | 25 |
| 6 AaB | 19 | 6 | - | 6 | - | 7 | 24 | 24 | 0 | 24 |
| 7 FCM | 19 | 5 | - | 6 | - | 8 | 26 | 37 | -11 | 21 |
| 8 Esbjerg | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 23 | 29 | -6 | 20 |
| 9 Silkeborg | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 16 | 28 | -12 | 20 |
| 10 AGF | 19 | 3 | - | 7 | - | 9 | 26 | 39 | -13 | 16 |
| 11 AC Horsens | 19 | 2 | - | 10 | - | 7 | 12 | 25 | -13 | 16 |
| 12 SønderjyskE | 19 | 3 | - | 4 | - | 12 | 23 | 41 | -18 | 13 |

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab), Rógvi Jacobsen (SønderjyskE)

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | mál | mál | v +/- | t stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 14 | 12 | - | 1 | - | 1 | 33 | 7 | 26 | 37 |
| 2 Man. Utd. | 13 | 8 | - | 3 | - | 2 | 21 | 13 | 8 | 27 |
| 3 Arsenal | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 22 | 10 | 12 | 26 |
| 4 Wigan | 13 | 8 | - | 1 | - | 4 | 16 | 10 | 6 | 25 |
| 5 Tottenham | 14 | 6 | - | 6 | - | 2 | 16 | 10 | 6 | 24 |
| 6 Bolton | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 15 | 13 | 2 | 23 |
| 7 Liverpool | 12 | 6 | - | 4 | - | 2 | 13 | 8 | 5 | 22 |
| 8 Man. City | 14 | 6 | - | 3 | - | 5 | 15 | 12 | 3 | 21 |
| 9 West Ham | 13 | 5 | - | 4 | - | 4 | 17 | 13 | 4 | 19 |
| 10 Middlesbr. | 14 | 5 | - | 4 | - | 5 | 20 | 20 | 0 | 19 |
| 11 Charlton | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 17 | 18 | -1 | 19 |
| 12 Newcastle | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 12 | 14 | -2 | 18 |
| 13 Blackburn | 14 | 5 | - | 3 | - | 6 | 15 | 18 | -3 | 18 |
| 14 Fulham | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 16 | 20 | -4 | 15 |
| 15 Aston Villa | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 14 | 22 | -8 | 15 |
| 16 Everton | 13 | 4 | - | 1 | - | 8 | 5 | 16 | -11 | 13 |
| 17 WBA | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 15 | 24 | -9 | 12 |
| 18 Portsmouth | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 11 | 20 | -9 | 10 |
| 19 Birmingham | 13 | 2 | - | 3 | - | 8 | 8 | 17 | -9 | 9 |
| 20 Sunderland | 14 | 1 | - | 2 | - | 11 | 12 | 28 | -16 | 5 |

Føroyskir leikarar: Ingi Højsted (Birmingham)

**Enska League Championship**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Reading | 21 | 15 | - | 5 | - | 1 | 38 | 11 | 27 | 50 |
| 2 Sheff Utd. | 21 | 14 | - | 4 | - | 3 | 42 | 21 | 21 | 46 |
| 3 Watford | 21 | 10 | - | 7 | - | 4 | 36 | 25 | 11 | 37 |
| 4 Leeds | 20 | 10 | - | 6 | - | 4 | 26 | 18 | 8 | 36 |
| 5 Luton | 21 | 10 | - | 4 | - | 7 | 33 | 28 | 5 | 34 |
| 6 Burnley | 21 | 9 | - | 4 | - | 8 | 30 | 25 | 5 | 31 |
| 7 Stoke | 21 | 10 | - | 1 | - | 10 | 25 | 28 | -3 | 31 |
| 8 Crystal Palace | 19 | 9 | - | 3 | - | 7 | 31 | 22 | 9 | 30 |
| 9 Wolverhampt. | 21 | 7 | - | 9 | - | 5 | 26 | 18 | 8 | 30 |
| 10 Preston | 21 | 6 | - | 11 | - | 4 | 24 | 20 | 4 | 29 |
| 11 Cardiff | 20 | 7 | - | 7 | - | 6 | 30 | 23 | 7 | 28 |
| 12 Southampt. | 20 | 5 | - | 12 | - | 3 | 23 | 18 | 5 | 27 |
| 13QPR | 21 | 6 | - | 7 | - | 8 | 23 | 30 | -7 | 25 |
| 14 Leicester | 20 | 5 | - | 9 | - | 6 | 22 | 23 | -1 | 24 |
| 15 Ipswich | 20 | 6 | - | 6 | - | 8 | 22 | 31 | -9 | 24 |
| 16 Norwich | 21 | 6 | - | 5 | - | 10 | 21 | 27 | -6 | 23 |
| 17 Derby | 21 | 4 | - | 10 | - | 7 | 27 | 32 | -5 | 22 |
| 18 Hull | 21 | 4 | - | 8 | - | 9 | 18 | 25 | -7 | 20 |
| 19 Plymouth | 20 | 4 | - | 8 | - | 8 | 16 | 25 | -9 | 20 |
| 20Sheff Wed | 21 | 4 | - | 8 | - | 9 | 17 | 27 | -10 | 20 |
| 21 Coventry | 21 | 3 | - | 10 | - | 8 | 24 | 33 | -9 | 19 |
| 22 Crewe | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 23 | 41 | -18 | 19 |
| 23 Brighton | 21 | 2 | - | 12 | - | 7 | 20 | 29 | -9 | 18 |
| 24 Millwall | 21 | 3 | - | 7 | - | 11 | 16 | 33 | -17 | 16 |